## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag**
Gul til stívt andøvsgul av norði og okkurt kavaælið, men um kvøldið minni vindur og yvirhøvur turt. Hitalagið millum ÷2 og ÷5 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum frostmarkið og +3 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av útsynningi og eitt skifti regn, annars sólglottar. Hitin millum 3 og 6 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin upp í stívt andøvsgul av útsynningi og yvirhøvur turt, men týsdagin upp í ein strúk av suðri og regn av og á. Hitin millum 4 og 8 stig.

# Føroya Bjór og Restorff brynja seg til P-dagin

**Páskabryggið hjá bæði Føroya Bjór og Restorff kom á marknaðin hósdagin. Føroya Bjór heldur fast um sama páskabryggj, sum vann kappingin í Selskab for Vestjysk øl kultur í fjør, meðan páskabryggið hjá Restorff er broytt nakað sammett við í fjør.**

PÁSKABRYGGJ

*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*







Hósmorgunin høvdu føroysku bryggjaríni, Føroya Bjór og Restorff, felags framløgu av nýggja páskabrygginum í Vertshúsinum. Í dag verður sonevndur P-dagur hildin, har ølelskarar fáa høvið at royna páskabryggið hjá Føroya Bjór og Restorff fyri ein bíligan pening.

Petur Petersen, sum er deildarleiðari á Føroya Bjór sigur, at Føroya Bjór hevur valt at halda fast um somu framleiðslu, sum varð bryggjað í fjør. Umframt at standa seg væl í Føroyum, vann páskabryggið hjá Føroya Bjór eina kapping í Jútlandi. Leiðslan í Føroya Bjór metti tí ikki, at tað var neyðugt at fremja nakrar broytingar í ár.

Johan Mortensen, annar av stjórunum á Restorff, sigur, at Restorff hevur valt at gera smávegis broytingar í fjør. Hann greiðir frá, at páskabryggið í ár er nakað ljósari enn í fjør

Nøkur fólk høvdu leitað á Vertshúsið hósmorgunin at royna nýggju páskabryggini hjá Føroya Bjór og Restorff og tey lótu sum heild væl at. Ølið hjá Føroya Bjór hevur størri fyllu enn tað hjá Restorff, sum er lættari og hevur sterkari eftirsmakk.

Hetta er fyrstu ferð, at kappingarneytarnir Føroya Bjór og Restorff hava felags framløgu av páskabrygginum og spurdir um fólk kunnu vænta at sleppa at keypa eina páskabryggj frá Restorff í Café Natúr ella eina Føroya Bjór í Vertshúsinum, hildu teir báðir Johan Mortensen og Petur Petersen skemtiligt fyri, at tað skulu fólk ikki rokna við

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷5 |
| Nuuk | 3 |
| Qaqortoq | 4 |
| Ammassalik | ÷5 |
| Saint John's | 0 |
| Halifax | ÷1 |
| Reykjavík | 0 |
| Seyðisfjørður | ÷2 |
| Tórshavn | 0 |
| Lerwick | 2 |
| Aberdeen | 0 |
| London | 2 |
| Tromsø | ÷4 |
| Bergen | 2 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 0 |
| Keypmannah. | 1 |
| Helsinki | ÷1 |
| Moskva | 0 |
| Berlin | 1 |
| Warzawa | 0 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | 1 |
| Paris | 4 |
| Madrid | 9 |
| Róm | 10 |
| Malorca | 13 |
| Athen | 16 |
| Malta | – |
| Tunis | 22 |
| Beijing | 9 |
| New Dehli | 28 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | – |
| New York | 2 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 14 |
| Meksikobýur | 23 |
| Panama | 31 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 29 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 984 hPa. við Tróndheim fer suðureftir og grynnist. Eitt hátrýst, 1036 hPa. í útsynning úr Íslandi fer í landsynning og viknar nakað.




Lágtrýstið yvir Íslandi fer í landsynning sunnan og væntast ikki at bera við Føroyar, men ger at vindurin minkar yvir Føroyum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 25/02 kl. 06[00]– 26/02 kl. 06[00]. Hitin í gjár: ÷1,4°
Minsti hiti máldur í feb.: ÷11,0° - Mesti hiti máldur í feb.: 11,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,4 mm – mált frá 25/02 kl. 06[00]–26/02 kl. 06[00]
Avfallið higartil í februar: 80,1 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

16. februar: Mánin næstur jørðini
20. februar: Tendring
28. februar: Fyrra kvarter/Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 27. feb | 11.42 | — | 10.42 | 23.05 | 10.57 | 23.20 | 01.19 | 13.42 | 02.19 | 14.42 | 09.57 | 22.20 | 08.57 | 21.20 | 11.57 | — | 00.34 | 12.57 | 11.27 | 23.50 | 00.19 | 12.42 |
| 28. feb | 00.05 | 12.42 | 11.42 | — | 11.57 | — | 02.05 | 14.42 | 03.05 | 15.42 | 10.57 | 23.34 | 09.57 | 22.34 | 00.20 | 12.57 | 01.20 | 13.57 | — | 12.27 | 01.05 | 13.42 |
| 29. feb | 01.19 | 13.55 | 00.19 | 12.55 | 00.34 | 13.10 | 03.19 | 15.55 | 04.19 | 16.55 | — | 12.10 | 11.10 | 23.47 | 01.34 | 14.10 | 02.34 | 15.10 | 01.04 | 13.40 | 02.19 | 14.55 |
| 1. mar | 02.32 | 14.55 | 01.32 | 13.55 | 01.47 | 14.10 | 04.32 | 16.55 | 05.32 | 17.55 | 00.47 | 13.10 | - | 12.10 | 02.47 | 15.10 | 03.47 | 16.10 | 02.17 | 14.40 | 03.32 | 15.55 |

5 707265 100050 >